verður roknað við, at hann fer at spæla aftur.

So var lív og rómur í Gundadali. B36 hevði takið. Ingi Højsted vísti styrki, sum ivaleyst bóru pluss við sær í bókina hjá landsliðsvenjaranum, Fróði Benjaminsen var sera stinnur í miðverjuni, Santos vísti síni góðu fótbóltsevni og Klæmint Matras tuskaði, bant saman og bakkaði upp soleiðis, sum lítið sjálvsóknir og týdningarmiklir spælarar gera tað.

Alt bendi á heimasigur og framhaldandi luttøku - uttan søguligu hagtølini. Og fýra minuttir undan steðginum lagaði tað seg soleiðis, sum tað á ongan hátt mátti gera. Eftir B36 bólttap og skjótt mótálop fekk ÍBV fríspark mitt fyri og seytjan metrar úr málinum. Manngarðurin var stórur, og Jákup tóktist líta heilt og fult á, at garðurin skuldi verja annan helmingin av málinum, og at hann tískil skuldi taka sær av hinum helminginum.

Ian Jeff lyfti spakuliga upp um manngarðin, og tá ið bólturin datt niður í B36 málið, spøkti kenslan, at tað enn eina ferð skuldi fara at kiksa, hóast tað hevði sæð so ljóst út.

Men B36 helt høvdið kalt. Teir settu máttleysa íslendska ÍBV upp á pláss, og stinna B36 verjan syrgi saman við verjukenda miðvøllinum fyri, at ÍBV ikki fekk óhugnaliga týdningarmikla næsta málið. Tað eydnaðist.

Í hinum endanum eydnaðist tað at fáa eitt mál afturat. Síðstu løtuna vóru tað tey, sum vendu sær burtur, tá ið ÍBV einstakar ferðir otaði seg fram á B36 hálvuna, og neglirnar vóru heilt niðurbitnar hjá fleiri, tá ið dómarin úr Luksemborg hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

Íslendingarnir vórðu sendir tómhentir aftur í Oyggjarnar, og B36 setti kós úr Ólavsøkuni og suður í Europa! Tað bar nýtt kapitul í føroysku fótbóltssøguni við sær.



*Ingi Højsted stóð seg sera væl á miðvøllinum hjá B36, og hann gav mangan ÍBV-leikarunum mikið høvuðbrýggj*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Símun Samuelsen fer til ÍA

Ungi vágbingurin Símun Samuelsen hevur skrivað undir ein trý ára sáttmála við íslendska felagið Keflavík.

Fyri nøkrum vikum síðani var Símun í Íslandi og royndarvandi, og hann hevur eftir øllum at døma imponerað venjaran í Keflavík, tí teir vildu hava hann at spæla fyri liðið skjótast gjørligt.

Símun hevur spælt væl fyri VB seinastu tíðina, og hansara avrik hava verið við til at lyfta VB upp úr botninum, har liðið lá fyrsta part av kappingini.

## Todi innskiftur í teprum sigri

Todi Jónsson varð skiftur inn í seinna hálvleiki, tá Start sunnukvøldið vann tepurt á Molde. Sostatt heldur Start fast um oddasessin, eftir at liðið í síðstu viku tapti í landskappingini.

Todi varð skiftur inn í 67. minutti fyri Bjarte Lunde Aarsheim. Fýra minuttir seinni vann Todi eitt hornaspark, sum langt um leingi endaði í netinum. Málskjútti var Steinar Pedersen.

Start er framvegis fremst í bestu norsku deildini - trý stig framman fyri Vålerenga.

## Andrew kom væl frá byrjan

Andrew av Fløtum nýtti bert fýra minuttir at fáa sítt fyrsta mál í hesum kappingarárinum.

Fremad Amager spældi á útivølli ímóti liðnum hjá Jón Róa Jacobsen, Frem. Jón Rói sjálvur var ikki við vegna skaða. Lokaluppgerðin millum tey bæði varð spæld við miklari ferð og nógvum málum.

Tá fýra minuttir vóru leiktir, var Andrew á blettinum og skoraði til 1-0.

Frem svaraði tó aftur, og við tveimum málum frá Lars Brøgger og Morten Hamm hvørjumegin steðgin legði Frem seg framum.

Men álopspartnarin hjá Andrew, Henrik Toft, javnaði til endaligu støðuna 2-2.

Samanumtikið var hetta ein góð byrjan uppá kappingarárið hjá Andrew og teimum í Fremad Amager.

## Rógvi hevur skift venjara

Vánaliga gongdin hevur havt við sær, at KR hevur skift venjaran út.

Rógvi Jacobsen og liðfelagarnir hjá honum í KR í Reykjavík hava fingið nýggjan venjara. Magnus Gilfason hevur sagt upp, og Sigurstein Gislason er settur sum nýggjur venjari. Hann hevur áður spælt við KR, og higartil í ár hevur hann verið unglingavenjari í felagnum.

KR hevur tapt fýra teir síðstu heimadystirnar, og vánaliga gongdin tveir teir fyrstu triðingarnar av kappingini hevur seinastu vikurnar verið mett sum bumba undir venjaranum, og nú er hann farin úr starvinum.

Tað er stuttur summarsteðgur í íslendskum fótbólti hetta vikuskiftið. Sunnudagin 7. august skal KR spæla á útivølli ímóti meistarunum og sannførandi oddaliðnum FH á Hafnafirði.

# Fróði verður leikbannaður

**Bæði í B36 og millum mótstøðumenninar eru teir nøgdir við, at føroyska liðið skal spæla í Miðjyllandi**

UEFA CUP

*Jóannes Hansen*

B36 umboðini vóru ikki á staðnum, tá ið lutur fríggjadagin ella ólavsøkudag varð drigin um, hvussu feløgini skulu hittast í næsta innleiðandi umfarinum í UEFA Cup kappingini. Skotbráðið var ov stutt at ferðast frá fyrra dystinum og til UEFA høvuðssætið, áðrenn lutakastið, sum var á middegi fríggjadagin.

Kjartan Mohr, formaður í B36, fekk boðini um, at B36 skal spæla ímóti FC Midtjylland umvegis fartelefonina, meðan hann var á helluni í Tinganesi, har tað hvørt ár verður skipað fyri sangløtu, eftir at sangløtan á Tinghúsvøllinum er av.

Frammanundan hevði UEFA flokkað feløgini, og í Norðurbólkini vóru styrkismettu feløgini, sum vóru møgulig mótstøðufeløg hjá B36, KRC Genk úr Belgia, Halmstad úr Svøríki, Viking Stavanger og SK Brann úr Noregi og FCM.

At luturin fall á danska felagið dámdi B36 formanninum væl:

- Talan er um spennandi mótstøðulið, og ferðingini fara tað neyvan at standast serligir trupulleikar av. Vit skulu flúgva til Billund og so koyra eitt sindur í bussi,. Tað er nógv øðrvísi, enn um vit skuldu farið eystureftir, heldur Kjartan Mohr.

Tað, sum B36 formaðurin iðrar seg mest um, er, at Fróði Benjaminsen er leikbannaður í fyrru uppgerðini, sum verður í Herning hósdagin 11. august. Fróði fekk gula kortið, tá ið B36 var í Vestmannaoyggjunum, og hann sá aftur gult ólavsøkudag.

### Stór uppliving

FC Midtjylland luttekur í UEFA Cup kappingini, tí teir fyrr í summar vunnu bronsukrónur í superliguni. Talan er um rættuliga nýtt felag. Tað er stovnað 1. juli í 1999 og er samanrenning av Herning Fremad og Ikast FS.

Felagið spælir heimadystirnar á SAS arenuni í Herning. Talan er um spildurnýtt stadion, og FCM stendur seg vanliga ógvuliga væl á heimavølli.

Millum spælararnar eru eitt nú vandamiklu álopsspælararnir David Nielsen og Frank Kristensen.

- Bæði ítróttarliga og hvat ferðingini viðvíkur er talan um ógvuliga gott lutakast, sigur Jens Ørgaard, ítróttarstjóri, og hann heldur fram:

- Fótbólturin í Føroyum er í spennandi menning, og vit gleða okkum at fáa høvi at síggja henda partin av kongaríkinum. Tað eru bara tey fægstu her í Danmark, sum fáa tað høvið.

FCM skal spæla í Havnini hósdagin 25. august.